# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvør "lumpaði" hvønn???

Fyri ½ ári síðani varð partur av Føroya Banka einskildur og bankin varð noteraður á almennum keypsskálum. Nógv vinnulívsfólk og privatfólk lógu framvið at keypa. Sambært prospektið kundi kursurin í mesta lagi vera kr. 189 fyri hvørt partabræv.

Áhugin at tekna var ovurhonds stórur – nógv størri enn nakar hevði droymt um. Yvirteknað varð fleiri ferðir og tey flestu fingu bert ein lítlan part av teimum partabrøvum, ið tey høvdu biðið um. Partabrøvini, ið vóru útvegað fyri kr. 189 pr stk, vóru stutt eftir handlaði á keypsskálum fyri Kr. 250. Ein vinningur uppá umleið 33% eftir fáum døgum!

Fleiri politikarar og atfinnarar, uttan mun til politiskan lit, vóru á gosi. Her var almenn ogn latin "vinum og kenningum" fyri undirprís. Onkur kravdi almenna hoyring, kanningarnevndir osfr tí nærum ein hálv milliard av "ogn Føroya fólks" var givin burtur.

Í dag hoyrist ikki nógv til hesar atfinnarar.

Tíðir broytast og partabrævavirði sveiggja. Í skrivandi stund er Føroya Banka partabrævið noterað til ein kurs, ið er 5% lægri enn tað, ið almenni fíggingargrunnurin seldi bankan fyri. Við verandi kursi má sigast, at grunnurin gjørdi ein góðan handil, tá partabrøv bankans vórðu seld. Tað er tí kanska viðkomandi at spyrja: Hvør "lumpaði" hvønn?

Teir keyparar, ið ikki fingu nóg mikið av partabrøvum fyri ½ ári síðani fyri Kr. 189 kunnu nú keypa á fría marknaðinum til lægri kurs.

Rokið um privatiseringina av bankanum lýsir sera væl, hvussu trupult tað er at áseta "rætta" kursin, og hvussu lætt tað er at finnast at teimum, ið hava ábyrgdina av fremja hetta í verki. Í dag má tó sigast, at serfrøðin var á heilt góðari leið, tá virðið varð ásett. Og tað er vert at hava í huga tá vit aftur fara at einskilja almenn feløg.

**Sosialurin**

## Er Torbjørn klikkaður

FRANK DAVIDSEN



Ella er tað ein álvarsligur valfepur, ið fær hann at snara kumpassina runt við tí úrsliti, at hann nú skal steðga Sandoyartunnlinum aftan á løgtingsvali, um hann fær undirtøku fyri tí, eins og útbyggingin av Vága floghavn. At hann harafturat saboterar sín egna partamann beint uppundir valið, vísir hvørki stórsinni ella disiplin, men tvørturímóti ein desperatan løgtingsmann, sum aftaná eitt stórt misálit til Fólkatingsvalið, nú roynir at bjarga sær nakrar atkvøður uppá eitt projekt, sum als ikki er búgvi at taka støðu til.

Mær er fortalt av skilamanni úr Lamba, búsitandi í Vágum, at menn við Skálafjørðin ikki kundu fara í torv í fleiri vikur, so nógvur mjørki var á eysturættini.

Sama ger seg galdandi í Tórshavn, har valla sæst ímillum húsini á eysturættum.

Sjálvsagt eru trupulleikar við mjørka á verandi flogvølli, eins og turbulensur á sunnanætt, alt annað vildi verið løgið. Men sum sagt, er hettar eitt fyribrigdi, óansæð hvar í Føroyum tú er staddur.

Og harafturat um ein metir útfrá tí orðaskifti, ið fram er farið ímillum leikmenn eins og serfrøðingar á økinum, so fer ein at ivast í, um tað yvirhøvur er gjørligt, at finna hóskandi lendi, til tann so nógv umstrídda altjóða flogvøllin.

Eg haldi, at tað hevði verið hóskandi at bíða, til allar neyðugar kanningar av altjóða serfrøðingum eru lidnar, tí tá kann væl henda, at hendan risaætlan er ein sápubløra, ið brestur, fyrst og fremst tí Føroyar er eitt pinkulítið oyggjaland og veðurviðurskiftini stórt sæð eru tey somu viðvíkjandi mjørka og turbulens, bæði á Glyvursnesi, á Skorðhædd og í Vágum.

**PS.** Tað er ein loddrøtt loygn, tá T. Jacobsen gevur lesarum ta fatan, at tað bert eru flogførini ið Atlantic hevur í løtuni, ið kunnu nýtast á Føroyaleiðini.

Seinast Maersk fleyg, nýttu teir flogfør av slagnum Boeing, ið tók 140 ferðafólk, eins og Airbus hevur flogfør, ið taka líka nógv sum boeing. So eg haldi, at trúvirði hjá T. Jacobsen er í botni í løtuni.

## Franska landsliðið

FRANK DAVIDSEN

Líka síðan franska landsliðið var í Føroyum, hava føroysku fjølmiðlarnir kóka súpan av hendingini, sum fór fram tá flogfarið lendi. Ein sera skakandi hending, ið als ikki átti at komið fyri, um leiðslan hjá franska landsliðnum ikki hevði verið so arrogant, soleiðis at teir ístaðin fyri at koma til Føroya í góðari tíð, so var bíða sum longst við komuni til Føroyar.

Sum vit øll vita, so kundi franska liðið ikki vera tey 3 stigini fyri uttan og avleiðingin hevði verið, at teir ikki kvalifiseraðu til endaspælið í EM, eins og tað vóru 50-100 milliónir kr. uppá spæl, so var trýstið stórt á leiðsluni. Tí skuldi flogfarið lenda fyri ein og hvønn prís og tað var orsøkin til tað ógvusligu hendingina, sum franskmenn nú aftaná geva flogvøllinum her skyldina fyri.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.